*– Vit hava arbeitt í 9 mánaðir við liðnum, men tað er nú, at tað veruliga fer at galda*

*John Petersen, hjálparvenjari á fóltbóltslandsliðnum*

SAMBAND
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
tlf 341800

ÍTRÓTTUR

# Georgia er fyrsta próvtøkan






*– Vit hava í longri tíð arbeitt við einum nýggjum spælistíli á landsliðnum, og í kvøld verður fyrsta próvtøkan fyri hetta arbeiðið. Eg eri sannførdur um, at tær broytingar, sum vit hava gjørt á liðnum, fara at rigga, og tað verður sjálvsagt spennandi at síggja, hvussu leikur nú fer ímóti Georgia, sigur John Petersen, hjálparvenjari á landsliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**- Vit hava í longri tíð arbeitt við einum nýggjum spælistíli á landsliðnum, og í kvøld verður fyrsta próvtøkan fyri hetta arbeiðið, sigur John Petersen, hjálparvenjari á landsliðnum, undan dystinum ímóti Georgia**

FØROYAR-GEORGIA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í kvøld skal venjaraparið Jógvan Martin Olsen og John Petersen fyri fyrstu standa á odda fyri føroyska fótbóltslandsliðnum í einum undankappingardysti, og spenningurin er stórur undan dystinum ímóti Georgia á Svangaskarði.

– Vit hava arbeitt í 9 mánaðir við liðnum, men tað er nú, at tað veruliga fer at galda, sigur John Petersen, sum er hjálparvenjari hjá Jógvan Martin Olsen.

– Vit hava í longri tíð arbeitt við einum nýggjum spælistíli á landsliðnum, og í kvøld verður fyrsta próvtøkan fyri hetta arbeiðið. Eg eri sannførdur um, at tær broytingar, sum vit hava gjørt á liðnum, fara at rigga, og tað verður sjálvsagt spennandi at síggja, hvussu leikur nú fer ímóti Georgia, sigur John Petersen.

### Nervar aftur at hóma

John Petersen var í fleiri ár stuðulsspælari á landsliðnum. Hann hevur spælt 57 landsdystir fyri Føroyar, og hann skoraði seks mál í hesum dystum.

John spældi sín seinasta landsdyst í 2004, men í fjør kom hann aftur á landsliðið. Nú var tað sum hjálparvenjari, og tað er ein nýggj og spennandi avbjóðing fyri 34 ára gamla John Petersen, sum ikki hevur stóru royndirnar sum venjari.

– Fyrstu ferðina var tað løgið at verða á landsliðnum sum venjari, men eg havi vant meg við mín nýggja leiklut, sigur hann.

– Hetta er ein sera spennandi uppgáva at fáa, og eg eri ikki minst spentur, nú fyrsti veruligi dysturin er fyri framman. Eg havi ikki havt nervar, síðani eg spældi á landsliðnum í 1995, men eg rokni við, at teir koma aftur áðrenn hendan dystin.

*Hevur tú funnið tín leiklut sum hjálparvenjari?*

– Eg havi verið nógv við á landsliðnum, so eg havi sæð, hvat hjálparvenjararnir undan mær hava gjørt. Eg havi mínar uppgávur á landsliðnum, og hesar uppgávur fái eg í samráð við Jógvan Martin.

### Ikki sannførandi á útivølli

Føroyar eru komnar ein sera truplan bólk í undankappingini til EM í 2008, og hóast fyrsti dysturin ikki er ímóti teimum sterkastu londunum í bólkunum, er mótstøðan nóg sterk til føroyska landsliðið. Georgia eigur nógvar góðar fótbóltsspælarar, og hóast størsta stjørnan á liðnum, Kakha Kaladze, ikki er við í Føroyum, er talan um eitt sterkt fótbóltslið, sum er styrkismett væl hægri enn føroyska liðið.

– Vit vita ikki so nógv um, hvussu Georgia spælir, men vit hava sæð onkrar dystir hjá teimum í seinastu undankappingini. Teir fingu millum annað javnleik ímóti Danmark, men vit síggja eisini á hagtølunum, at teir ikki hava verið serliga sannførandi á útivølli, sigur John Petersen.

– Tað verður eisini sera spennandi at síggja, hvussu okkara lið fer at standa seg ímóti Georgia, og hvussu okkara broytingar í spælistílinum koma at rigga ímóti júst hesum liðnum.

Dysturin millum Føroyar og Georgia verður á Svangaskarði í kvøld kl. 19.00.

## Dómarin er úr Norðurírlandi

Tað verður Michael Ross úr Norðurírlandi, sum skal halda skil á dystinum millum Føroyar og Georgia í kvøld.

UEFA sendir eisini ein umboðsmann, sum skal tryggja at umstøðurnar kring dystin eru í lagi, og hesaferð er umboðsmaðurin úr Svøríki. Hann eitur Lars-Åke Bjørck.

## Karstin skal verja NSÍ-málið

**Karstin Joensen, sum byrjaði kappingarárið í ÍF, skal sunnudagin standa í málinum hjá NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið NSÍ um vikuskiftið spældi dyst ímóti ÍF í Fuglafirði, endaði ein støða móti dystarenda við, at málmaðurin Jens Martin Knudsen fekk reyða kortið.

Dómin metti, at Jens Martin hevði hevnt seg eftir ein samanbrest við Bartal Eliasen, og so var hann vístur út.

NSÍ skal næstu tvey umførini spæla týðandi dystir ímótu HB og B36, og tað er sannlíkt, at Jens Martin hevur leikbann í báðum dystunum. Hann hevur í øllum førum leikbann til dystin ímóti HB í Runavík sunnudagin, og líknandi støður fyrr í ár hava havt við sær, at spælarar hava fingið leikbann í tveir dystir, og tað kann Jens Martin eisini fáa. Avgerðin um leikbannið er ikki tikin enn.

Tórður Thomsen er ungur og evnaríkur málmaður úr Runavík, men hann er í hesum kappingarárinum leigaður út til B68, og nú kann hann ikki kallast heimaftur, um NSÍ skuldi ynskt tað í hesi støðuni.

NSÍ hevur hin veginavloysaran hjá Jens Martini kláran til dystin sunnudagin. Tað er klaksvíkingurin Karstin Joensen, sum byrjaði hetta kappingarárið sum málmaður í ÍF og áður hevur vart málið hjá KÍ. Hann flutti fyrr í hesum kappingarárinum til NSÍ, men hevur gjørt lítið við fótbóltin har.

Ætlanin hevur allatíðina verið, at Karstin skuldi verða tøkur eftir summarsteðgin, og nú er longu brúk fyri honum til dystin ímóti HB sunnudagin.

– Tað er altíð spell at missa ein royndan spælara sum Jens Martin, men vit hava tíbetur ein góðan avloysara kláran til dystin sunnudagin. Karstin er ein góður málmaður, og hann hevur spælt nógv í fremstu deildini, sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ.